# Ein dagur í barnahúsi

**Mikudagin vóru vit og vitjaðu Barnahúsið Margit í Klaksvík, har tað ganga 64 børn í fýra ymiskum stovum. Stovurnar eita Várperlan, Summarperlan, Heystperlan og Vetrarperlan. Vit vitjaðu Várperluna og Vetrarperluna**

STARVSPRAKTIKANTAR
*Annika Lamhauge-Mortensen*
*Jóhanna Sofía Hansdóttir*
*Tórshavnar Kommunuskúli*






*Páll og Elisa vísa okkum málningar, ið børnini hava gjørt. Páll, Vetrarperlan: - Mær dámar at spæla kríggj, í dag havi eg spælt cowboy. Elisa, Vetrarperlan: - Mær dámar at spæla mammu og børn, og í dag havi eg spælt prinsessur, borg og kanin*



Eli, 4 ár, Vetrarperlan: - Mær dámar væl at spæla inni við Mcqueen, og eg havi eisini Mcqueen matpakka. Í dag havi eg spælt við Kristian og Samuel



*Erla, 3 ár, Várperlan: - Mær dámar at spæla úti og inni*



## AVLOYSARAR FYRI STARVSFÓLK Í FARLOYVI

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum sum avloysarar fyri starvsfólk, sum í løtuni starvast í toymi við børnum við autismu í Eysturoynni. Arbeitt verður eftir skúlatíð hjá børnunum til kl. 17.30.

Tímatalið er 25 tímar um vikuna.

## NÁMSFRØÐINGAR

Søkt verður eisini eftir námsfrøðingum at avloysa starvsfólk, sum í løtuni starvast í toymi í Tórshavn. Arbeitt verður eftir skúlatíð hjá børnunum.

Tímatalið er 23 og 25 tímar um vikuna.

**ENDURLÝSING:**

## STUÐULSFÓLKASKIPANIN FYRI BØRN SØKIR EFTIR STARVSFÓLKI TIL STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um námsfrøðingur ikki søkir starvið, verður hjálparfólk sett í størvini.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til: Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Argjaboðagøta 7, 160 Argir.

Umsóknarfreistin er 20. januar 2009.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina á tel. 353570

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

stuðulsfólkaskipanin fyri børn

KREA